DAGSINS MEINING

Ballið buðið?

Eftir fundin í útvarpshøllini um kreppuna og hennara orsøkir og fylgjur hevur almenna orðaskiftið verið domineræd av øllum uttan tí evni, ið har var til viðgerðar. Tað tykist sum moralsku herindini hjá Jensi av Rana og Høgna Hoydal hava størri áhuga enn tær hendingar, sum fyri 10 árum síðani elvdu til, at millum fimm og sjey túsund føroyingar flýddu av landinum undan vinnuloysi og elendigheit. Men hetta skal tó ikki forða okkum í at venda aftur til orðaskiftið.

Undir orðaskiftinum í útvarpshøllini var niðurlagið: "Ongantíð aftur ein sætti oktober!" Men samstundis avdúkaðu nakrir av luttakarunum, at hetta ikki var heilt óhugsandi kortini. Víst var á, at vit framvegis onga trygd hava fyri, at figgjareftirlitið ikki knappliga ein morgun møtir upp og aftur niðurskrivar virðini á húsum og virkjum. Vit hava einki figgjareftirlit, men bert ein kaffifund millum Karsten Hansen og Thor Petersen einaferð um árið. Hetta gevur lítið innlit!

Víðari verður víst á, at skipanin við fiski-og veiðiloyvum í sjálvum sær er ódámlig og ódemokratisk. Ávísir persónar fáa loyvi at nýta tilfeingið, sum vit øll eiga og enntá fáa teir loyvi at spekulera við hesum loyvum og selja tey til okursprísir. Privatir ríka seg upp av fólksins ognum! Her má vend koma í hvørt tað so skal vera við tilfeingisrentu ella aðrari skipan, skulu vit lata liggja, men óskilið, sum nú valdar, kann ikki halda fram.

Eftir fundin hava eisini verið ávís tekin um, at herrópið Ongantíð aftur skal takast við fyrivarni. Landsbankastjórin hevur víst á krepputekin í figgjarlógaruppskotinum. Hann mælir til at uttanlandaskulkdin verður ratað. Hví? Jú, tí farið verður helst longu koandi figgjarár út at lána til almenna raksturin. Hann sigur ikki hví, tað kann hann av goðum grundum ikki, men orsøkin er tann harðrenda og fyrilitsleysa skerjingin av blokkinum. Her er meginrosøkin til ta fullkomuliga perspektivleysu og jánkasligu figgjarlógina fyri 2003. Hon osar av svartskygni og ótta fyri framtíðini og hon signalerar klárt og greitt, at vit eiga ikki fyri rakstur í 2003. Hetta gevur einum varhuga av, at samgongan leggur ikki kortini á borðið. Hetta skapar ótryggleika og ótta millum manna og í vinnulívinum, og kann hetta í sjálvum sær elva til, at tað, sum ongantíð skuldi henda aftur, fer at henda kortini. Ballið tikið vera buðið, og kunnu vit takka harrðenda figgjarpolitikkinum og blokkfundamentalistunum fyri tað!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ja, lat OECD kanna føroyska búskapin, og ikki Høgna Hoydal

Katrin Dahl Jakobsen

Í hósdagsblaðnum kemur Høgni Hoydal aftur við einari av sínum hjálparleysu óseriøsu hugleiðingum, úr fuglaperspektivi sjálvandi, kólandi niður yvir allar hinar politisku óvitarnar. Hesin Mr. Know All er so evindaliga troyttur av at sveima í einseminum har uppi, meðan øll hini "drukna í partapolitiskum tvassari", sum hann skírir øll onnur at vera stødd. Troyttandi at vera í so vánaligum selskapi.

Tá veruleikin er beiskur

Í greinini endurtekur hann tað, sum aðrir hava fört fram seinastu dagarnar- at lata altjóða viðurkendar stovnar gera regluligar metingar av búskaparstøðuni hjá okkum. Tað haldi eg vera eitt gott hugskot! Treingir ongantíð meira til enn nú, soleiðis sum stýrt hevur verið seinastu fýra árini. Hetta, hóast stýringsamboðini ongantíð hava verið betri enn nú, bæði so og so. At samfelagið kostar 1150 mió. kr. meira at reka í dag, enn tá Høgni Høydal tók við, er skelkandi, og komið fram sjálvt fyri løgmanni, meðan hann dró vilini á Viðareiði. So antin kann man bara fara á flog, sum Høgni Hoydal, tosa um okkurt annað og látast at hava eina so "yvirornaða" dagsskrá, sum tey tápuligu ikki skilja ella stinga av sum løgmaður, tá veruleikin skal tyggjast.

Høgni Hoydal sigur, at áðrenn 1999 bleiv nógv meira brúkt árliga, enn figgjarlógirnar vístu.

Vælsignaður, royn at vera bara eitt lítið sindur sannur í tí, tú kemur við. Øll vita um allar eykajáttanarlógirnar hesi seinastu fýra árini. Tað er, um Høgni Hoydal kanska helst vildi tað, ikki nøkur statshemmiligheit. Hesar munnu tátta upp ímóti 470 mió!!! Tær hava ikki staðið á nakrari figgjarlóg!!!Og skal OECD kanna nakað, høvdu teir so neyvan tikið figgjarógaruppskotið fyri 2003 fyri fyri góða vøru, sum støði undir undir figgjarpolitikkinum. Hesa kladdu, sum hon millum manna verður ropt.

Okkurt er galið við flognum

Eg veit, at tað nyttar ikki at øsa seg upp yvir ein skerdan fugl, sum í berari neyð roynir at fáa eitt sindur av uppdrift undir sínar skerdu veingir. Tí er gott at síggja tað komiska í hesi svaduni yvir øll hini, eisini samgongulimir, sum verða skírd partapolitisk møsn, tá Høgni Hoydal sjálvur kavar so lúkst í partapolitiska tvassið. Her fáa øll av at vita. Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin viðvíkjandi uppskoti um nýggjan stuðul, sum eingin kennir nakað til!! At andstøðuflokkarnir mæla til at brúka allan blokkstuðulin!!!! Hvat billar maðurin sær inn? Og hetta ætlar hann at fáa OECD at kanna. Hetta er partapolitiskt tvass, sum bara kann koma frá Høgna Hoydal. Tað kundi verið áhugavert at skift orð um slíkar óheftar kanningar, men henda greinin er so óseriøs og skuldi bara tæna sum partapolitiskt álop á øll onnur enn "skribentin" sjálvan, og royna at flyta kjakið frá veruleikanum. Eini figgjarlóg, við 2 mió. í avlopi áðrenn skattalættan uppá 50 mió., undirsjóvartunnil 32 mió., fólkaskúlin 6 mió., sernámsfrøði 1,3 mió. o.s.v.

Høgni skal krita banan fyri OECD

Alfaðirliga vísir Høgni Hoydal á spurningar, sum eitt nú OECD eigur at svara í eini møguligari kanning. Gott hjá teimum at vita, líkasum. Eg skal ikki taka nakað frá manninum, sum helst hevur lisið og eksperimenteað seg til so mangt, men eg eri vís í, at slíkur stovnur fer neyvan at biðja Høgna Hoydal um ráð at seta rammurnar um slíka kanning. Tað eru tey før fyri sjálvi. Við Høgnasa primitivu vegleiðing høvdu tey endað so lúkst í partapolitiskum tvassi.

Motorsúkkludansur á Argjum

TÍÐINDASKRIV
Føroya MC

Leygarkvøldið 2. november skipar áhugafelagið Føroya-MC fyri almenum dansi í róðrarnestinum á Argjum. Tað verða teir vælumtóktu Twilight, sum fara at spæla til dansin.

Róðrarneystið á Argjun er rúmligt og væleydnað til dans, borð og stólar verða settt upp, og møgileiki verður eisini at fáa okkurt leskandi.

Føroya-Mc er áhugafelag, felagið var stovnað í 2000, og er endamál felagsins at røkja áhugamál hjá motorsúkkluáhuganum í Føroyum. Hetta er millum annað at skipa fyri felagstiltøkum og arbeiða fyri betri trygd og skilakoyring. Felagið gevur eisini eitt út blað, har dentur millum annað verður lagdur á at hava tilfar um viðlíkahald og trygd.

Slík arbeiði kostar pengar og roynir felagið at útvega figging til hetta á ymiskan hátt. Og dansiltiltakið 2. november er ein liður í hesum arbeiði.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Einskiljingar av kreppuloysnum skulu rinda uttanlandsskuld

Kristina Háfoss
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin

Øll vita vit, at ongin peningur kann veita fult endurgjald fyri tann høga prís, ið mangir føroyingar máttu rinda í kreppuárunum, men tíðin er nú búgvin til, at føroyingar fáa samfelagsbúskaparligt endurgjald fyri tær kreppuloysnir í fiski- og bankavinnunum, ið føroyski skattgjaldarin mátti rinda.

Tí skulu inntøkur frá einskiljingum av Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasølu og Føroya Banka nýtast til at rinda aftur føroysku uttanlandsskuldina, ið m.a. er til orsaka av, at føroyski skattgjaldarin bjargaði nevndu fyritøkunum í kreppuárunum. Harvið kann føroyska sam-felagið sleppa undan stórum rentuútreiðslum, gerast minni skuldarbundið og meira sjálvbjargið.

Greiðar linjur millum alment og privat

Nógvar eru orsøkirnar - men ein av orsøkunum til, at skilagott er við einskiljing av fyritøkunum, ið gjørdust almennar vegna kreppuna er, at neyðugt er at fáa so greiðar linjur millum alment og privat virsemi sum møguligt. Tí alneyðugt er, at byrgja upp fyri politiskari uppiblanding í føroyskum vinnulívi og at tryggja, at greitt er, hvør hevur ábyrgdina og hvør átekur sær vágan.

Tað almenna hevur tørv á einum sterkum vinnulívi, ið kastar av sær til samfelagið og somuleiðis hevur vinnulívið tørv á einum vælvirkandi almennum sektori, ið tryggjar m.a. grundarlagið fyri at reka nútímans vinnulív - men týðandi er at hava greiðar linjur millum hesi.

Lat tað privata um at reka vanligt vinnuvirksemi soleiðis, at tað almenna kann nýta tíð og orku til at tryggja øllum føroyingum góðar og javnbjóðis almennar tænastur. Tað verið seg eitt nú almanna- og heilsutænastur, útbúgvingar, mentanartilboð og gransking. Somuleiðis framkomið samferðslu- og samskiftisnet. Og sum heild at tryggja, at vit hava eitt einfalt, framkomið og rættvíst lógarverk, ið skapar góðar og tryggar karmar um føroyska samfelagið.

Minni almennur vági og minni kappingaravlaging

Enn ein orsøk til at einskilja Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasølu og Føroya Banka er, at á henda hátt verður almenni fíggjarligi vágin fluttur yvir á privatar hendur. Samlaði samfelagvágin vil tó altíð verða til staðar og minnast vit eisini øll hvat hendi í kreppuárunum tá tað almenna átók sær at bjarga ávísum fyritøkum innan fiski- og bankaheimin og harvið átók sær vágan - men als ikki er víst at so verður gjørt í framtíðini. Eru fyritøkurnar privatar heldur enn almennar, hevur tað almenna møguleika fyri at taka støðu til fíggjarligar bjargingar í hvørjum einstøkum føri. Alneyðugt er tó við einum heilt greiðum boðskapi frá tí almenna sum er, at greiðar linjur eru millum tað privata og almenna, og at vinnulívið ikki skal væntað almennan stuðul gerast tíðirnar verri. Annars gerst úrslitið skjótt tað sama sum við veðhaldspolitikkinum í 80'inum.

Eisini er tað, at almennur peningur verður nýttur at keypa fyritøkur uttan at nakað avlop krevst afturfyri kappingaravlagandi. Tí stórtsæð allar aðrar privatar fyritøkur skulu gjalda eigarum sínum avlop, með-an hetta ikki ger seg galdandi fyri føroyskar almennar fyritøkur - Føroya Banki tó undantikin.

Avmarka útlendskan ognarpart

Av alstórum týdningi er tó, at tað - sersakliga í samband við einskiljing av fyritøkum innan fiskivinnuna - verða ásettar ávísar avmarkingar fyri útlendskum ognarparti og at alt verður gjørt til tess at forða fyri strámannavirksemi. Útlendskar íløgur eru vælkomnar í ávísan mun, men tað er avgerandi, at ognarrætturin til føroyska tilfeingið verður varðveittur á føroyskum hondum.

Frígivin almenn virðir skulu rinda skuld

Enn ein fyrimunur við, at einskilja áður nevndu fyritøkur er, at tað almenna á henda hátt fær frígivnar stórar peningarligar upphæddir, ið eru bundnar í stóru almennu fyritøkunum.

Landsstýrið hevur í dag smáar 4 mia. kr. í eginpeningi í fyritøkum - av hesum hevur Føroya Banki um 1,4 mia. kr. í eginpeningi. Søluvirðið má tó væntast at verða hægri.

Hetta er peningur, sum við undantaki frá Føroya Banka, ikki gevur nakað beinleiðis avkast til landskassan og peningur, sum í nógvum førum kundi verið nýttur øðrvísi og meira gevandi. Heldur skuldi almenni peningurin í nevndu fyritøkunum verið settur í ein komandi búskapargrunn, fyri síðan at verið nýttur til at rinda aftur uttanlandsskuld landsins.

Kunnu sleppa undan 323 mió. kr. um árið

Uttanlandsskuld landskassans er í dag um 4,2 mia. kr. og gjalda føroyingar 323 mió. kr. um árið í rentum og avdráttum fram til 2018. Verða inntøkurnar frá einskiljingunum av bara áðurnevndu trimum fyritøkunum nýttar til at rinda aftur skuld, so verður uttanlandsskuldin helst meira enn hálverað. Harvið kann føroyski landskassin spara stórar rentuútreiðslur og kann verða skuldarfríur eftir fáum árum - um hetta verður ynskt.

Nevnast kann, at landið eigur um 2,5 mia. kr. (við árslok) í uppsparing í Landsbankanum, men rætt er framhaldandi at hava ein tryggan landskassa við góðum gjaldføri og tí verður ikki mælt til at nýta av hesi uppsparing til at rinda uttanlandsskuld í løtuni.

Ikki einskilja almennar tænastur

Alt ov ofta verður kjakið um einskiljingar gjørt til eitt "fyri ella ímóti einskiljingum"-kjak. Men so einfaldur er spurningurin um einskiljingar ikki. Eitt nú er stórur munur á fyritøkum, ið reka reint vinnuligt virksemi og fyritøkum, ið veita almennar tænastur. Tjóðveldisflokkurin tekur ikki undir við, at einskilja eitt nú Postverk Føroya, Strandfaraskip Landsins, Landsverkfrøðingin ella aðrar grundleggjandi partar av føroyska samfelagnum (heldur ikki føroysku landsjørðina).

Tí heldur enn at fáa eina betri og bíligari tænastu kann úrslitið skjótt gerast ein sundurpettan av almennum tænastum til nøkur privat virki ella persónar, ið síðan mugu fáa eina játtan á figgjarlógini fyri at reka tænastuna. Í lítlum samfelagi sum tí føroyska, kann einskiljing ofta enda við privatum monopoli - tá heldur hava alment monopol, ið tryggjar at samfelagsliga atlitið verður raðfest hægst tá umræður almennar tænastur.

Skuldarfríar og sjálvbjargnar Føroyar í eyðsjón

Men Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasøla og Føroya Banki eru allar fyritøkur, ið vórðu figgjarliga bjargaðar av tí almenna undir kreppuárunum og hóast tær reka privat vinnuvirksemi burturav, gjørdust tær harvið almenn ogn. Ætlanin hevur ongantíð verið, at hesar skuldu halda áfram við at verða almenn ogn, og nú fyritøkurnar eru væl fyri og til fullnar kunnu standa á egnum beinum - ja, so er tað nú, at føroyski skattgjaldarin kann fáa endurgjald fyri peningin, ið varð nýttur at bjarga fyritøkurnar.

Tjóðveldisflokkurin vil gera sítt til, at hesar fyritøkur - umvegis varliga og gjøgnumskygda einskiljing - gerast privat vinnuvirksemi aftur, og at inntøkurnar frá einskiljingunum koma øllum føroyingum til góðar við at rinda aftur føroysku uttanlandsskuldina, til frama fyri einum meira sjálvbjargnum føroyskum búskapi og samfelagi.

Til Atla P. Dam á sjeytiára degnum

- yrking, ið borin var fram á sjeytiára degnum

Av góðum bergi brotin
fólk og Føroyar fram at føra
Vaksin upp við sjóvar strond
har báran møtti hellurond
Á Tvøroyri aldist so mangur alvi
lærdi seg leikir í lívsins talvi
við móðurmjolk seyg tú innlit og hugsjón
um javnari menning og bjartari vón
Har javnaðarvøggan á kletti stóð
stóð eisini tín á grundini góð
Maður kemur í mansins stað
eisini tá høvdingar leggjast ein dag
tungan arv at lyfta
hjá fáum mundi slík royndin nytta
at sigla faðirs kjalarvørr
og longur á leið føra prúðari knørr

Fattur steig eðilingur á hallargólv fram
brá sínum brandi, á víðvøllum vann
Við snildi hann talar og leikar so væl
vitugur - vinnur - í orð og í tal
Tá njótast skal sigur í sál
og hartvunnin hjartamál
fá hava stríðið kent og leikin sæð
uttan møddi kappin í fremsta rað
Í harðasta víggi leiddi lið fram á leið
eftir droyrreyðum grasi, har høgg
mangan sveið
tá stríð loksins lætnar
og útsjónin batnar
í sjónarringi har hómast vón
og sigurin kyndir í hjørtunum glóð
har rættvísi fjálga seg kann
- tagna brandaljóð

Trygt við lær goyma sigursmenn brand
- høgt uppá tindar at skoða nýtt land
- víðari heim at nema
Í mansaldur stóð tú við stýrisvøl
á havinum stóra, tú førdi kjøl
So mangt eitt roysni úr hondum greiddi
manning trygt í havn tú leiddi
staddir í vanda
- einki tó mundi granda

Nú høvdingi stinnur um sjeyti fer
tillukku skal ti ljóma her
Kletturin ert tú á Føroya grund
vardi tá stormar leiktu í lund
Kappin reysti
- tøkk fyri stríð og treysti

Tøkk

Vit takka øllum hjartaliga fyri sýnda samkenslu tá ið elskaði maður mín, pápi og abbi okkara

LASSE HOLM

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum, Ríkissjúkrahúsinum, Hotel Tórshavn, Almannastovuni, Hjálpitólarmiðstøðini, Heimarøktini og Føroya Felag móti Krabbameini fyri góðan stuðul.
Eisini eina hjartans tøkk til øll tykkum, ið hava verið um okkum og hjálpt hesa sváru tíð.

Fyri tey avvarðandi
Súsanna, Randi, Rannvá, Rógvi, Rasmus og lítli Heini

Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

Kári Dalsgaard Petersen
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Takk til Marjun Bæk, kirkjutænarar, sangarar, Føroya Symfoniorkestur, Tórshavnar Manskór, tykkum, sum hjálptu til, tykkum, sum sendu blómur og kransar og annars øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

vegna familjuna
Atli, Uni og Búi